FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

NVD *Rit*

# Túrfrágreiðing

Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka

17.-21. september 1999

*Cruise report: Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*September 17-21th 1999*

Eyðfinn Magnussen



NVD*Rit* 1999:1

SERRITGERÐ
Thesis

TØKNIFRÁGREIÐING
Technical Report

UNDIRVÍSINGARTILFAR
Teaching Material

UPPRIT
Notes

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN
Faculty of Science and Technology

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
University of the Faroe Islands

*Heiti / Title* **Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka 17.-21. september 1999**
*Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank September 17-21th 1999*

Høvundur / Author **Eyðfinn Magnussen**

Ritslag / Report Type Tøknifrágreiðing/*Technical Report*

***NVD*Rit** 1999:1
© Náttúruvísindadeildin og høvundurin

Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

**Fólk við frá FRS:** Regin Kristiansen, Arnhold Henriksen, Marit Pedersen og Eyðfinn Magnussen

**Ábyrgd:** Eyðfinn Magnussen

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa eitt mát fyri nøgdini og biologiini, hjá teimum týdningarmestu fiskasløgunum, ið finnast á Føroyabanka. Eisini varð hugt at teimum oceanografisku viðurskiftunum á Bankanum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum, breitlar 60 m og 120 m, Steinhamns lemmar, temperatur-/dýpdarmátari og Seabird-CTD.

**Um túrin:** Farið varð av Havnini 16. september kl. 22.00. Fyrsta CTD-støðin varð tikin á Føroyabanka 17. september kl. 05.00. Seinasta støðin varð tikin 20. september kl. 14.17. Túrurin samsvaraði við ætlanina. Á Føroyabanka vóru tiknar 29 trolstøðir og 12 CTD støðir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Magarnir vórðu sorteraðir umborð. Mátingarnar frá temperaturmátarinum á trolinum eru upparbeidd. Úrslitini eru klár og verða víst í hesi frágreiðingini. Úrslitini frá Imponatorskipanini eru rættlisin og løgd í databasuna.

**Fyribilsúrslit:**

**Hiti:** Á mynd 1 er miðalhitin á botni vístur fyri hvørt hál. Miðaltølini eru hitin mátaður niðri við botnin, meðan tovað verður. Á myndini sæst, at sjógvurin er heitastur inni á bankanum og kølnar so út ímóti kantinum.

| Fiskaslag | Landað veiða (kg) september 1999 | Landað veiða (kg) september 1998 | Tal av nytrum/roðslum | Tal av magum |
|---|---|---|---|---|
| Toskur | 1718 | 5920 | 300 | 79 |
| Hýsa | 7045 | 6142 | 357 | 99 |
| Upsi | 1074 | 875 | 261 | 56 |
| Longa | 35 | 206 | - | - |
| Blálonga | 13 | 123 | - | - |
| Brosma | - | 23 | - | - |
| Kongafiskur | 17 | 117 | - | - |
| Havtaska | 17 | 29 | - | - |
| Kalvi | 131 | - | - | - |
| Steinbýtur | - | 5 | - | - |
| Tunga | 5 | 9 | 24 | - |
| Skrubba | - | - | 8 | - |
| Lálla | - | - | 12 | - |
| Mathøgguslokkur | 2037 | 1374 | - | - |
| Tilsamans | 12092 | 14823 | 962 | 234 |

***Talva 1**: Landaða veiðan og talið av prøvum, ið vórðu tiknir á Føroyabankatúrinum 17-21 september 1999.*

**Toskur:** Íalt vóru 3.132 kg av toski veidd á Føroyabanka, samanborið við 7.821 kg á heysti 1998 (talva 2). Landaða veiðan var 1.718 kg samanborið við 5920 kg í september 1998. Verður hugt at toskafiskiskapinum á yvirlitistrolingunum um heystarnar frá 1991 sæst, at fiskiskapurin fram til 1997 var í vøkstri (mynd 3), men hevur síðani veri minkandi. Hendan túrin var miðalveiðan 108 kg pr tov.

Longdarbýtið á samlaðu veiðuni er víst á mynd 2. Út frá longdini á fiskinum er mett um aldurin. Ì veiðini av toski í september 1998 var næstan eingin toskur minni enn 70 cm. Ì ár er hettar broytt eitt sindur, nú hava vit ein lítlan topp á 65 cm. Hettar er 2, møguliga 3, ára gamal toskur. Á myndini síggjast eisini nakrir smáfiskar 30-40 cm. Miðallongdin fyri tosk var 86 cm samanborið við 89 cm í september 1998.

**Hýsa:** Í alt 10.694 kg av hýsu vórðu fingin á túrinum (talva 2). Í september 1998 vórðu fingin íalt 8.905 kg . Longdarbýtið fyri hýsu er víst á mynd 4. Nógv var til av smáari hýsu, ið var uml. 15 cm til longdar, hettar er yvaleyst hýsa , sum er gýtt í vár. Hesin støddarbólkurin var ikki í veiðuni á heysti 1998; tá var nóg at fáa av hýsu, sum var uml 27 cm til longdar, hettar er ivaleyst tann hýsan , sum nú er góðar 30 cm til longdar. Samlaða miðallongdin fyri hýsuna var 41 cm, sum er júst tað sama sum fyri einum ári síðani. Á mynd 5 er víst miðalveiðan á yvirlitistrolingunum á heysti 1991-1999. Her sæst, at veiðan av hýsu øll árini hevur hevur verið í vøkstri. Í ár vóru fingin 369 kr pr tov, og er hetta tann besta veiðan í hesum tíðarskeiðnum.

**Upsi:** Samlaða veiðan av upsa var 1.401 kg, hettar er á leið tað sama, sum var fingið fyri einum ári síðani, tá 1.034 kg váru fiskaði (talva 2). Á mynd 6 sæst longdarbýtið á upsanum. Longdarbýtið er tað sama sum fyri einum ári síðani. Í ár var miðallongdin 67 cm í mun til 65 cm fyri einum ári síðani. Á mynd 7 er víst miðalveiðan á heystyvirlitistrolingunum. Á ár vóru í miðal fingin 48 kg pr tov, í mun til 36 kg pr tov á heysti 1998.




*Mynd 1: Miðalhitin við botnin fyri hvørt tov; mátaður í tíðarskeiðnum 17-21. september 1999.*

| Turnr | Dagar | Mánið Ár | Tal av tovum | Toskur | | Hýsa | | Upsi | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | Samlað veiða | Miðal veiða pr tov | Samlað veiða | Miðal veiða pr tov | Samlað veiða | Miðal veiða pr tov |
| 9164 | 2-4 | sept 1991 | 11 | 270 | 25 | 178 | 16 | 36 | 3 |
| 9256 | 24-25 | juli 1992 | 2 | 189 | 95 | 17 | 9 | 15 | 8 |
| 9668 | 6-10 | sept 1996 | 33 | 6359 | 193 | 6303 | 191 | 170 | 5 |
| 9772 | 4-8 | sept 1997 | 29 | 9210 | 318 | 8311 | 287 | 2415 | 83 |
| 9872 | 18-22 | sept 1998 | 29 | 7821 | 270 | 8905 | 307 | 1034 | 36 |
| 9972 | 17-21 | sept 1999 | 29 | 3132 | 108 | 10694 | 369 | 1401 | 48 |

***Talva 2:*** *Veiðan (kg) av toski, hýsu og upsa í heyst-yvirlitistrolingunumá Føroyabanka.*




***Mynd 2****: Samlað longdarbýtið á toski fiskaður á Føroyabanka í tíðarskeiðnum 17-21. september 1999.*




***Mynd 3:*** *Miðalveiðan (kg) av toski í heyst-yvirlitistrolingunumá Føroyabanka.*




*__Mynd 4__: Samlað longdarbýtið á hýsu fiskaður á Føroyabanka í tíðarskeiðnum 17-21. september 1999.*




***Mynd 5:*** *Miðalveiðan (kg) av hýsu í heyst-yvirlitistrolingunumá Føroyabanka.*




*__Mynd 6__: Samlað longdarbýtið á upsa fiskaður á Føroyabanka í tíðarskeiðnum 17-21. september 1999.*




***Mynd 7:*** *Miðalveiðan (kg) av upsa í heyst-yvirlitistrolingunumá Føroyabanka.*

Tórshavn 29. oktober 1999

Eyðfinn Magnussen